## DAGSINS MEINING

# Exit Helena

Hósdagin fyrrapartin var greitt, at dagarnir hjá Helenu Dam á Neystabø sum landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum vórðu taldir. Fyrst í vikuni fekk løgmaður ta løgfrøðiligu kanningina, sum løgdeildin hevði gjørt, og tað var beinanvegin greitt í tí politiska umhvørvinum, at kanningin var tyngjandi fyri landsstýrismannin.

Tí var spurningurin, um landsstýrismaðurin fór av sínum eintingum, ella um løgmaður varð noyddur at loysa hana úr starvi, sum tað so hábærisliga eitur í stýrisskipanarlógini. Harafturat var spurningurin, um málið fekk avleiðingar fyri samgonguna og serliga politikk hennara í sjálvstýrismálinum.

Men Helena Dam á Neystabø sá skriftina á vegginum, og var so mikið at sær komin, at hon - óivað í samráð við Sjálvstýrisflokkin - bað løgmann loysa seg úr starvi. Og higartil bendir einki á, at hetta málið hevur fingið avleiðingar fyri sjálvstýristilgongdina.

Kanningin sigur, at í trimum av fimm dømum handlaði landsstýrismaðurin í heimildarloysi. Skjøl, sum landsstýrismaðurin í fyrstu atløgu ikki flýggjað landsstýrismálanevndini, tá hon viðgjørdi málið, vísa, at spurningurin um heimildina fyri kunngerðini um eina persónliga viðbót var nágreinliga viðgjørdur í Almanna- og heilsumálastýrinum saman við Helenu Dam á Neystabø.

Hetta merkir, at hon var greið yvir, at tað var ivasamt við heimildini, men hon tók avgerðina, sum hon vísti á á tíðindafundinum ígjár. Og, sum hon legði afturat, at tá ein skeiv avgerð er tikin, er neyðugt at taka avleiðingarnar av gerðini. So kunnu vit seta spurnartekin við, um løgfrøðiliga ráðgevingin var nóg góð ella ikki, ella um Løgdeildin kundi havt forða fyri kunngerðunum.

Men eftir stendur, at táverandi stjórin á Almannastovuni í eini blaðgrein staðfesti, at kunngerðirnar vóru ólógligar. Stjórin segði seg úr starvi og spurningurin er, um hon noktaði at umsita kunngerðir, sum ikki vóru í tráð við forsorgarlógina. Ásannast má, at talan er um eitt stórt og torført øki at umsita, og at tað er tvingandi neyðugt við eini fram úr góðari umsiting. Men her haltar kanska eisini, nú tað frættist, at fleiri starvsfólk - fullrúar og deildarstjórar - rýma av skútuni.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Elmar Ellingsgaard 70



Mánadagin 26. februar verður Elmar Ellingsgaard, barberurin undir Sjómansheiminum, 70 ár.

Elmar er eiðismaður, sonur Johonnu og Jógvan á Forðunum á Eiði. Johanna var úr Tjørnuvík og Jógvan av Eiði. Tveir eru teir, brøðurnir. Elmar og Páll, sum býr í Danmark.

Elmar er giftur Lenu Ellingsgaard í Fjósinum, sum eisini er av Eiði. Kortini eru tey búsett i Havn, har Elmar ein mansaldur hevur arbeitt sum barberur. Elmar og Lena eiga fýra synir, Inga, Leif, Jón og eftirnølaran Brand.

Eiðismaður er Elmar , og hóast hann í ein mansaldur hevur búð í Havn, fornoktar hansara eiðismál ikki, hvaðani hann kemur.

Nógvar góðar søgur hevur hann fingið við øll hesi árini undir Sjómansheiminum, har hann í langa tíð arbeiddi saman við grannanum í Stoffalág, Viggo Frandsen.

Elmar vaks upp á Eiði og varð ivaleyst roknað við, at hann fór at verða timburmaður ella snikkari, eins og pápin. Ikki gjørdist tað tó lívsstarv hansara, men heldur annað handverk. Nevniliga at klippa fólki.

Áðrenn hann gjørdist hárskeri, var Elmar tó til skips eini tvey ár seinast í fíratiárunum og upplivdi eisini at fara á land undir dramatiskum umstøðum uppi á Norðurlandinum í Íslandi. Tað var við Havfrúnni, sum fór á land í ringum líkindum uppi við Siglufjørðin í oktober 1949. Øll manningin varð tó bjargað í øllum góðum.

Hetta lívið mundi hann ikki halda vera nakað soleiðis at dúva uppá, so hann fór til Havnar at læra til barber hjá Valdemari Poulsen, og tað gjørdist hansara lívsstarv burturav.

Síðan man sjólívið mest hava avmarkað seg til onkran túr við Eiriki Reyða við útgangsstøði av Vestaru Vág.

Elmar hevur arbeitt sum hárskeri, ella barberur, sum tað varð nevnt, í útvið eina hálva øld. Ikki eru tað so fáir knokkar, hann hevur snøggað hesa tíðina. Nógvir eru teir bygdarmenn, sum komnir eru til Havnar, sum hava leitað sær inn á klippistovuna undir Sjómansheiminum at fáa snøgga sær hár og skegg hjá Elmari. Og ótaldar eru søgurna, har eru fortaldar. Elmar veit altíð onkra, tá tú kemur á tal við hann.

Seinnu árini var Elmar meira ella minni einsamallur, tá makkarin, Frandsen, doyði. Og seinastu árini flutti hann niðan til sín sjálvs í Stoffalág at klippa. Tó tað kanska var meira soleiðis niðurtrapping.

Ikki verður leingi til mæsta runda føðingardagin i familjuni. Tey eru nevniliga javngomul, Elmar og Lena bæði. Lena verður 70 ár í summar.

Tykkum verður ynskt hjartaliga tillukku.

**ej**

### Náttúruvinur fyllir seksti

Í dag, 24. februar, fyllir Jákup Dahl í Hoydølum 60 ár.

Við sínum unga og lætta sinni er tað helst mangur, ið undrast, at Jákup longu rundar tey seksti. Jákup er útbúgvin verkfrøðingur. M. a. var hann eitt skifti lærari á Tekniska skúla. Tey seinastu mongu árini hevur hann starvast á Føroya Sjóvatrygging.

Frítíðaráhugamálini hjá Jákupi eru ógvuliga nær tengd at náttúruni og tí sum livir í náttúruni. Nevnast kann m.a., at Jákup var við til at stovna FNU – Føroya Náttúru og Umhvørvisverndarfelag. Føroya Síla-veiðufelag hevur hann eisini verið ein hollur stuðul, eitt tíðarskeið sum nevndarlimur, og grindaspurningurin hevur somuleiðis hansara stóra áhuga. Jákup nýtir ein sera stóran part av tíð síni í garðinum, sum man teljast millum vakrastu blettir í Hoyvík og Havnini í heila tikið. Mong eru tey, sum hava støðgað á og notið vøksturin har er, og eisini fingið góða plantuvegleiðing frá Jákupi. Hann hevur verið náttúruáhugaðum í Føroyum ein dyggur stuðul. Garðurin hjá Jákup er eisini kendur uttan fyri landoddarnar, og útlendsk ferðaløg hava verið har at kunnað seg um sjáldsaman gróður í Føroyum og eru farin aftur haðani væl klókari. Hansara stóra vitan um trø hevur ført við sær, at hann er limur í Dansk Dendrologisk Forening, ein felagskapur fyri træsamlarar.

Hann er eisini sera áhugaður í gomlum myndum og bókum, og man hann eiga eina av bestu samlingum av upprunaútgávum av føroyskum bókum. Eisini myndlistin stendur hansara hjarta nær.

Tað at vera abbi tekur nú meiri av tíðini hjá Jákupi, men hann sýnist at trívast ógvuliga væl í hesum leiklutinum.

Vit ynskja Jákupi Dahl hjartaliga tillukku við degnum.

## Tøkk



Eina hjartans tøkk til tykkum øll, sum við blómum, telegrammum, telefonuppringingum, gávum og á annan hátt gleddu meg á mínum 80 ára føðingardegi.

Tøkk til tykkum, ið vaktu meg við sangi og hornblástri, tykkum mongu, sum hjálptu til, og øllum tykkum, ið vitjaðu, bæði heima og í Skálanum.

Hjartaliga tøkk øll somul, at tit gjørdu mær dagin til eitt ógloymandi minni.

*Kærar heilsanir*

**Anna Nielsen**


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Málið um partapeningin útsett

**Viðgerðin av uppskotinum hjá Javnaðarflokkinum um at Løgtingi skal seta partapening í Smyril Line, er útsett. Nýggir upplýsingar í málinum fingu uppskotsstillaran at biða um at fáa málið útsett, tá tað var fyri í Fíggjarnevndini í gjár**

PARTAPENINGUR
*Edvard Joensen*



*Í løtuni er ymiskt, sum bendir á, at uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um at seta partapening í Smyril Line ikki fær meiriluta í fíggjarnevndini og kanska verður tikið aftur*

Javnaðarflokkurin hevur biðið um at fáa fíggjarnevndarviðgerðina av tingmálinum um at seta partapening í Smyril Line útsetta. Grundgevingin er, at nýggir upplýsingar fyriliggja í málinum, skilst á keldum, Sosialurin hevur tosað við.

Sosialurin hevur frætt, at í skjølum, Fíggjarnevndin hevur fingið frá Smyril Line, verður sagt, at roknað verður við eini øking í farmaflutninginum í ár upp á 70 prosent í mun til í fjør. Og tá nýggja Norrøna er komin, roknar Smyril Line við eini tvífaldan av farmaflutninginum beinanveg umframt upp aftur størri øking í komandi árum.

Fíggjarnevndarlimir vilja ikki siga nakað um málið. Men Sosialurin skilir, at nýggja støðan, sum er íkomin hevur gjørt onkran teirra enn meira ivasaman, og at møguleikin hjá Javnaðarflokkinum at fáa uppskotið samtykt, er minkandi.

Sum skilst eru vónirnar hjá Javnaðarflokkinum ikki stórar at fáa meiriluta í Fíggjarnevndini fyri málinum, og sostatt kann væntast, at uppskotið í ringasta føri verður tikið aftur.

Men sum er, er viðgerðin bara útsett, til fíggjarnevndarlimir hava sett seg inn i nýggju upplýsingarnar, sum Fíggjarnevndin hevur fingið.

Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, sigur í stuttari viðmerking, at hann hevur ikki so nógv meira at viðmerkja.

Hann váttar, at verður støðan tann, at Løgtingi ikki fer at seta partapening í Smyril Line, er tað sjálvandi ein keðilig støða fyri felagið.

Framtaksgrunnurin hevur verið nevndur sum ein innskjótari, nú nýggjur partapeningur skal teknast. Og okkurt er, sum hevur bent á, at grunnurin fór at seta partapening í Smyril Line, um annars aðrar treytir vórðu uppfyltar.

Jend Kári Vilhelm, stjóri í Framtaksgrunninum, sigur, at tað tykist, sum fólk hava fingið ta fatan, at Framtaksgrunnurin sum eina sjálvfylgju setir partapening í Smyril Line. Men so er ikki, sigur hann, uttan tó at siga, at grunnurin ikki fer at seta pening í. Tí tað er als ikki endaliga avgjørt enn.


